# »DARWIN FORKLÁRAÐI NÓGV, MEN IKKI ALT. OG NÚ ER TÍÐIN KOMIN TIL AT FARA VÍÐARI«

MENNINGARLÆRA **DARWINS** VAR EITT FANTASTISKT FRAMBROT. MEN TANN **RELIGIØSI** KRITIKKURIN HEVUR RÆTT Í, AT LÆRAN HEVUR NØKUR HOL. TAÐ METIR DANSKI PROFESSARIN **JESPER HOFFMEYER**, SUM Í NÝGGJARI BÓK ÚTPEIKAR TVINNAR FÍGGINDAR: TA FUNDAMENTALISTISKU **RELIGIÓNINA** OG TA VÍÐGONGDU **DARWINISMUNA**, SUM HALDA LÍV Í HVØRJI AÐRARI.





SAMRØÐA
**Heini í Skorini**
heini_skorini@yahoo.com

Um onkur fjarhugsin sál framvegis ikki hevur fingið tað við, so er 2009 vorðið fagnaðarár fyri Charles Darwin, sum varð føddur fyri 200 árum síðani, og sum fyri 150 árum síðani gav út sítt høvuðsverk við heitinum »Origin of Species«. Bókin, sum grundlegði okkara fatan av, hvussu lív hevur ment seg á jørðini, og sum kollvelti heimin.

Men læra Darwins um menning lívsins frá einføldum til samansettar organismur ígjøgnum natúrliga úrveljing er framvegis ein støðug kelda til stríð, ofta millum átrúnaðin øðrumegin og náttúruvísindina hinumegin. Hetta hóast tað eisini eru kreftir, sum dúgliga royna at byggja brýr millum Darwin og Bíbliuna.

Tankin um, at menniskjan »bert« er eitt úrslit av lívsins menningargongd ígjøgnum milliónir av árum, er framvegis ein herskin biti fyri mong. Og samanbresturin millum darwinistar og kreationistar er størri enn nakrantíð. Ikki minst í heimsins superveldi vestan hav, USA.

## Tann triði vegurin

Í seinastu viku hevði Studentaskúlin í Hoydølum vitjan av einum 67 ára gomlum professara í biokemi frá Københavns Universiteti. Navnið er Jesper Hoffmeyer. Í ártíggjur hevur hann verið ein sjónlig rødd í kjakinum um vísindi og trúgv, og á vitjanini í Føroyum helt hann fyrilestur í høllini á Nabb fyri nøkrum hundrað studentaskúlanæmingum. Tað hugvekjandi við manninum er, at hann hvørki góðtekur modernaðu darwinismuna ella átrúnaðarliga grundaðar frágreiðingar um lívið.

– Menningarlæra Darwins var eitt fantastiskt vísindaligt frambrot, sum náttúruvísindin líka síðani hevur bygt á. Men tann religiøsi kritikkurin hevur rætt í, at menningarlæran hevur nøkur hol, sigur Jesper Hoffmeyer, tá vit hittast eitt illsligt fríggjakvøld á kaféini Hvonn í Havn.

Hoffmeyer heldur, at tíðin er komin til at útbyggja læru Darwins og korrigera veikleikarnar við menningarlæruni. Men hansara boðskapur er ikki fallin í góða jørð í lívfrøðiliga umhvørvinum í Danmark. Sjálvur heldur professarin, at manglandi viljin til at kritisera Darwin og koma víðari er fremsta orsøkin til, at fólk fella fyri »religiøsum og antivísindaligum forteljingum um lívið«, sum hann málber seg.

> Darwinisman hevur nakrar veikleikar, sum lívfrøðingar ikki vilja kennast við. Og tað skapar gróðrarlíkindi fyri anti-vísindaligari religión

– Á henda hátt livir tann religiøsa fundamentalisman av tí náttúruvísindaligu fundamentalismuni. Mítt prosjekt er at menna ein triðja veg, sigur Hoffmeyer, sum nú hevur fingið sær eina bjór inni á myrku kaféini í Vágsbotni í Havn. Hann spyr, um eg havi lisið hansara nýggjastu bók, sum kom út í vár, og sum ber heitið »Tro på tvivl – kritik af religiøs og videnskabelig ufornuft«. Tað havi eg tíbetur.



*Jesper Hoffmeyer, professari*

– Men hvat hevur tú so at spyrja meg um? Alt stendur í bókini, sigur hann spakmæltur og við einum varligum brosi.

Í umstríddu bókini leggur Hoffmeyer dent á, at hann er post-darwinistur og ikki anti-darwinistur. Hann setur als ikki spurnartekin við boðskap Darwins